JARÐFEINGI
FAROESE EARTH AND ENERGY DIRECTORATE

# Visti tú, at gólvið í SMS er gamal havbotnur við fossilum av fornum høgguslokkum?

Í reyðbrúna gólvinum í SMS finnur tú nakrar serligar strikur skapaðar sum bein horn. Hetta eru fossilir av einum djóraslagi, sum minnir um fornhøgguslokkar. Djóraslagið eitur Orthoceras. Grótslagið, sum gólvflísarnar eru gjørdar úr, er kálksteinur úr Ølandi í Svøríki.





**Kom og granska fossilir!**

Far og leita eftir hesum fornu høgguslokkunum í gólvinum í SMS. Hvussu nógv fossilir finnur tú?

Kanska finnur tú fleiri ymisk sløg?

**Hví granska fossilir?**

Við at granska fossilir av  m.a. plantum og djórum í jørðini fáa vit ein hóp at vita um, hvussu umhvørvið var fyri langari tíð síðan.

Føroyar eru bygdar upp av basalti frá eldgosum. Í hesum umhvørvi verða bert fá fossilir varðveitt. Eitt nú bløð og trø eru funnin, men eingi djórasløg.

Fossilini í Føroyum vísa, at í føroyska økinum var subtropiskur frumskógur fyri næstan 60 milliónum árum síðan.



Orthoceras livdi í havinum fyri meir enn 400 milliónum árum síðan.
Høvdið og armarnir komu út úr skelini, og vit kunnu ímynda okkum, hvussu Orthoceras veiddi djór í havinum.